

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 01 - 2013

# Íslendingar siga ja til oljuvinnu

Í seinastuni hevur eitt sindur av kjaki verið í Íslandi, um tað er rætt at loyva oljufeløgum at útvinna olju á Drekaleiðini, tí at eitt møguligt óhapp kann fáa stórar avleiðingar fyri umhvørvið. Men nú vísir ein meiningakanning, at nógv teir flestu íslendingarnir taka undir við at lata oljufeløgini fara til arbeiðis. Í kanningini, sum Stöð 2 og Fréttablaðið hava gjørt, siga 80 prosent ja til at loyva oljuvinnu á Drekaleiðini. 52 prosent taka av fullum huga undir við oljuvinnu, og 28 prosent halda tað vera tað rætta. 11 prosent hava onga meining um tað, fimm prosent hava hug at vera ímóti, og fýra prosent siga bart út nei. Tað eru serliga politikarar hjá flokkinum VG, sum hava sagt seg vera í iva, um tað er rætt at loyva oljuvinnu, men kanningin vísir, at eisini í tí flokkinum er meiriluti fyri at loyva tí. Herfyri lótu íslendsku orkumyndugleikarnir tvey leitiloyvi á Drekaleiðini. Millum feløgini, sum fingu loyvini, er Faroe Petroleum.